**Kristjan Árnason** Fylgiskjal 37

| | |
|---|---|
| **Fra:** | Anita Fuglø <anita@kaf.fo> på vegne af Kommunala arbeiðsgevarafelagið <kaf@torshavn.fo> |
| **Sendt:** | 17. januar 2020 14:16 |
| **Til:** | Almannamálaráðið |
| **Emne:** | SV: Lógaruppskot til ummælis |

Góðan dagin,

Víst verður til lógaruppskot, ið vóru send Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum til hoyringar tann 23. desember 2019.

1. Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin)
2. Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (tvingsilslógin)

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið metir tað skilagott, at Landsstýrið raðfestir at dagføra lógargrundarlagið undir vælferðartænastum hjá landinum til fyrimuns fyri starvsfólk hjá landi og kommunum – og ikki minst fyri borgararnar.

Serstakar viðmerkingar
Viðv. § 53 um upplýsingarskyldu og reglur um afturgjald er at siga, at Almannaverkið við greinini fær serliga víðar heimildir at útvega sær persónligar upplýsingar viðv. borgarum í starvi hjá einum kommunalum arbeiðsgevara, kanska eisini upplýsingar, sum eru fevndir av aðrari lóggávu, harímillum av lógini um persónupplýsingar. Hóast hendan heimild er grundað á samtykki frá einum borgara, so kann ein ivast í, hvørt tað veruliga er neyðugt at herða hesa reglu – í mun til galdandi ásetingar í fyrisitingarlógini, tá upplýsingarnar í flestu førum kunnu fáast til vega frá øðrum myndugleika.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur ikki fleiri viðmerkingar til lógaruppskotini, annað enn tað, at felagið tekur undir við teimum viðmerkingum, sum Kommunufelagið hevur sent Almannamálaráðnum hesum viðvíkjandi.

Vinarliga

Anita Fuglø, leiðari

Kommunala
Arbeiðsgevarafelagið

R.C. Effersøesgøta 26
FO - 100 Tórshavn

Tlf.: + 298 226339
Mail: anita@kaf.fo
Homepage: www.kaf.fo

**Fra:** Almannamálaráðið [mailto:amr@amr.fo]
**Sendt:** 23. december 2019 16:17
**Til:** Almannaverkið <av@av.fo>; Brúkaraumboðið <bruk@bruk.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Stovnur kommunufelagið <kf@kf.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Kappingareftirlitið <kapping@kapping.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Mentamálaráðið <ummr@ummr.fo>; ro@fo.stm.dk; Tryggingareftirlitið <tryggingareftirlitid@tryggingareftirlitid.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; industry@industry.fo; stefan@industry.fo; Kommunala arbeiðsgevarafelagið <kaf@torshavn.fo>; lp@mail.fo; megd@megd.fo; antares@antares.fo; pensjon@betri.fo; info@banknordik.fo; liv@liv.fo; sunij@mail.fo; heilsurokt@gmail.com; ark@ark.fo; bio@post.olivant.fo; blf@blf.fo; etf@etf.fo; poulk@vh.fo; ff@farmakonom.dk; hajsim@lsh.fo;

sjukrarokt@sjukrarokt.fo; poulk@vh.fo; fafelag@fafelag.fo; info@fiskimannafelag.fo; fhf@fhf.fo; samtak@samtak.fo; lararaf@lararafelag.fo; Føroya Politistafelag <politistafelag@gmail.com>; samfiol@olivant.fo; mlf@mlf.fo; fsn <fsn@fsn.fo>; jorginv@tsk.fo; fys@fys.fo; haf@haf.fo; hak@hak.fo; handverk@handverk.fo; heimahj@post.olivant.fo; heilsurokt@gmail.com; lsdavmi@ls.fo; samtak@samtak.fo; lfh@lfh.fo; annikabh@hotmail.com; masshoydal@gmail.com; akf@akf.fo; mf <mf@mf.fo>; pedagog@pedagogfelag.fo; rit@rit.fo; skfelag@skfelag.fo; starvsmannafelag@starvsmannafelag.fo; srfelag@gmail.com; mg@fve.fo; yf@post.olivant.fo; theol@hotmail.com
**Cc:** Eyðun Mohr Hansen <eydun.mohr.hansen@amr.fo>; Sólgerð Hjørleifsdóttir <solgerd.hjorleifsdottir@amr.fo>
**Emne:** Lógaruppskot til ummælis

Góðan dag

Við hesum verður sent til ummælis

1. Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin)
2. Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (tvingsilslógin)

Fyri at lætta um, er harumframt hjáløgd ein frágreiðing um broytingarnar í báðum lógaruppskotunum og javntekstur, so til ber at samanbera broytingarnar við uppskotini, ið vórðu løgd fyri tingið í síðstu tingsetu.

Ongar innihaldsligar broytingar eru gjørdar í fylgilógunum til hesar báðar høvuðslógir, t.e. í uppskotunum um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., og í uppskotunum um barnavernd og kærunevnd og í almannapensjónslógini, síðani uppskotini vórðu løgd fram seinast. Tí verða tey uppskotini ikki send til ummælis aftur.

Freistin at svara er sett til fríggjadagin 17. januar 2020 kl. 15.00 og verður at senda til amr@amr.fo.

Vinarliga/Sincerely

Almannamálaráðið/Ministry of Social Affairs
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon +298 304000
amr@amr.fo • www.amr.fo